# Semingsstovnurin

Ímillum

**Fíggjarmálaráðið** øðrumegin
og
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag** hinumegin,

verður gjørd henda semja:

Í sáttmálanum viðvíkjandi Strandfaraskipum Landsins, sum fór úr gildi 01.10.2013 verða gjørdar hesar broytingar:

## Lønartalva

í lønartalvu pr. 01.10.2012 verða gjørdar hesar broytingar galdandi frá 01.10.2013:
Allar mánaðarlønir hækka Kr. 190,00 + 0,9%

í lønartalvu pr. 01.10.2013 verða gjørdar hesar broytingar galdandi frá 01.10.2014:
Allar mánaðarlønir hækka 0,9%

í lønartalvu pr. 01.10.2014 verða gjørdar hesar broytingar galdandi frá 01.10.2015:
Allar mánaðarlønir hækka 1,0%

## § 5. Tímaløn

Tímalønin verður roknað soleiðis:

Frá 1. Januar 2014:
Ársløn á viðkomandi stigi / 2496

Frá 1. Januar 2015:
Ársløn á viðkomandi stigi / 2444

Frá 1. Januar 2016:
Ársløn á viðkomandi stigi / 2366

## § 9. Lønar- og tænastualdur

Í stk. 2 verður innsett ”skipari/stýrimaður” í staðin fyri ”sjómaður”.

## § 12. Arbeiðstíð

Stk. 1 verður, galdandi frá 01.01.2014, broytt soleiðis:

Arbeiðstíðin verður løgd soleiðis, at arbeiðstíðin í 2 mánaðir ikki er omanfyri 2x208,0 tímar (208,0 = 48 x 52/12), og arbeiðstíðin í ein mánað ikki er omanfyri 250 tímar. Arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri hvørjar tveir mánaðir. Í staðbundnari avtalu, gjørd millum reiðarí og felagið, kann verða vikið frá ásetingunum um, hvussu langt tíðarskeið, arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri.

Stk. 1 verður, galdandi frá 01.01.2015, broytt soleiðis:

Arbeiðstíðin verður løgd soleiðis, at arbeiðstíðin í 2 mánaðir ikki er omanfyri 2x203,7 tímar (203.7 = 47 x 52/12), og arbeiðstíðin í ein mánað ikki er omanfyri 250 tímar. Arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri hvørjar tveir mánaðir. Í staðbundnari avtalu, gjørd millum reiðarí og felagið, kann verða vikið frá ásetingunum um, hvussu langt tíðarskeið, arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri.

Stk. 1 verður, galdandi frá 01.01.2016, broytt soleiðis:

Arbeiðstíðin verður løgd soleiðis, at arbeiðstíðin í 2 mánaðir ikki er omanfyri 2x197,2 tímar (197,2 = 45.5 x 52/12), og arbeiðstíðin í ein mánað ikki er omanfyri 250 tímar. Arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri hvørjar tveir mánaðir. Í staðbundnari avtalu, gjørd millum reiðarí og felagið, kann verða vikið frá ásetingunum um, hvussu langt tíðarskeið, arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri.

***Stk. 2***. Fyri avloysara verður arbeiðstíðin gjørd upp fyri hvønn mánaða, tó kann arbeiðstíðin í ein mánaða ikki vera omanfyri 300 tímar.

***Stk. 3***. Staðbundin avtala kann eisini verða gjørd avtala millum reiðarí og felagið um, at arbeiðstíðin á einum skipi ella á einari farleið verður broytt. Mánaðarlønin verður tá broytt soleiðis:

Frá 01.01.2014:

1/208,0 fyri hvønn tíma.

Frá 01.01.2015:
1/203,7 fyri hvønn tíma.

Frá 01.01.2016:
1/197,2 fyri hvønn tíma.

Báðir partar kunnu uppsiga avtaluna við 3 mánað freist, til ein fyrsta í mánaðinum.

**Stk. 7**. Arbeiðstíðin kann slítast tvær ferðir um dagin, og skal slitið verða 1 tími samanhangandi, áðrenn tað kann dragast frá arbeiðstíðini. Hesum viðvíkjandi verður víst til avmarkingarnar í Kunngerð nr. 107, frá 2. November 2012 um hvílitíðina hjá sjófólki. § 6, stk. 2.

## § 16. Kostpeningur

Kr. 100,00 verður broytt til Kr. 107,00.

## § 25. Samráðingar, seming og arbeiðssteðgur

Sum nýtt stk. 2 - 5

**Stk. 2**. Í samband við arbeiðssteðg, binda partarnir seg til at lata skipini á øllum farleiðum sigla minst einaferð um samdøgnið. Sigling í Kallsoynna, í Sandoynna og til Nólsoyar skal tó verða minst 2 ferðir um dagin í 21 dagar. Aftan á tað skulu partarnir verða samdir um framhaldandi sigling.

**Stk. 3**. Útoyggjar eru undantiknar skerjingini í siglingini smb. Stk. 2. Undantakið er galdandi fyri leiðirnar 58, 66.

**Stk. 3.** Sum arbeiðssteðgur er her at rokna verkfall, verkbann, ella onnur niðurlegging av arbeiðinum.

**Stk. 4**. Sigling smb. Stk. 2. verður lønt við tímalønini (ásett í §5) x 1.5, fyri í minsta lagi fyri 4 tímar hvørja ferð.

**Stk. 5**. Ásetingin um sigling smb. stk 2, er galdandi frá tí at arbeiðssteðgur er settur í verk smb. serstakari avtalu um fráboðan av arbeiðssteðgi.

## § 27. Gildi sáttmálans

Nýtt stk 1.

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. Oktober 2013 at rokna. Sáttmálin kann uppsigast av báðum pørtum við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1. 0ktober 2016.

**Í Skopunarfirði tann 7. November 2013**

| **Føroya Skipara- og Navigatørfelag** | **Fíggjarmálaráðið** |
|---|---|
| *Eyðstein Djurhuus, formaður* | *Jørgin Niclasen, landsstýrismaður* |
| *Regin Nónstein* | *Snorri Fjallsbak, stjóri* |
| *Gulak Gulaksen* | |